# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Gott val Obama!

Hóast amerikanska forsetavalið ikki hevur nakað beinleiðis við føroyingar at gera, so er tað tó ein sannroynd, at nógvir føroyingar fylgja hesum vali, sum var talan um val av egnum forseta.

Onkur man tí helst spyrja, hví vit her úti í Atlantshavi hava so stóran áhuga fyri júst hesum valinum! Sum heimsins stórveldi nr. 1 og sum tað landið, ið uppá gott og ilt er við til at seta dagsskránna í so mongum gerandisligum og altjóða viðurskiftum, er tað ikki so løgið, at eygu og oyru eru vend móti USA til eitt tað størsta hæddarpunktið har, nevniliga valið av nýggjum forseta.

Tað fer eingin tíðindasending framvið, uttan at USA ella amerikanarar eru partur av hesi so ella so. Sum heimsins ríkasta tjóð og sum tann, ið legði lunnar undir tað demokrati/fólkaræði vit kenna til í dag, so er tað ikki so løgið heldur, at nettupp henda tjóð so oftani er snúningspunktið.

Vit gloyma ikki amerikanska innsatsin í øðrum heimsbardaga, har amerikanskir hermenn og amerikonsk tøkni bardu niður bæði týsku og japonsku krígsmaskinurnar og harvið tryggjaðu okkum tað frælsi og ta vælferð vit kenna til í dag.

Tað er eisini ein sannroynd, at USA er og vil vera heimsins politi, tí tað ynskir at tryggja hetta frælsi. Hetta er ein leiklutur, ið landið hevur megnað og megnar bæði væl og minni væl. So grundfest er demokratiið í USA, at amerikanarar síggja fegnir, at eisini onnur lond, ið liva undir ófrælsi, kunnu gerast partur av demokratiska heiminum. Men tíverri hava skiftandi forsetar og stjórnir í USA misskilt og misbrúkt henda leiklut. Her stendur Vietnamkríggið sum ein ræðumynd og ein lærupeningi. Og sama er við Irak. Ikki tí – vit øll í Vesturheiminum ynskja, at irakiska fólkið skal vera frælst og hava tað gott, men vit mugu eisini kenna okkara vitjanartíð.

Bushfólkini hava ikki virt hesa sannroynd. Høgraekstremisma og høgraheykar hava við síni maktgyrnd og vanvirðing av øðrum fólkum, flokkum og sjónarmiðjum, ið tey hava stemlað demokratar=s osialisma=kommunisma=gudloysingar, skapt eina vanvirðiliga støðu og hava dálkað skjaldamerki demokratisins, frælsa dialogin, og tí er umheimurin farin at venda sama USA, sum so stór virðing hevur verið fyri, bakið. Tíðin er komin til at fáa hesa virðing aftur í hásæti, og tað kann hon, verður Obama valdur til forseta. Ikki tí at hann hevur svarið uppá allar spurningar, men tí hann gevur okkum eina vón um, at USA eisini fer at geva pláss fyri dúgvunum í framtíðar politikkinum. Amerikanarar og vit onnur hava fingið nokk av víðgongdu høgraheykunum í Washington. Við Obama kunnu fátækir amerikanarar vónandi síggja fram til eina sjúkratrygd, ið er ein av grundarsteinunum undir einum demokratiskum og humanum samfelag. Og við Obama kann heimurin allur vónandi síggja fram til eitt USA, sum í sínum leikluti sum heimspoliti í hvussu so er tekur dialogstavin í aðra hondina, heldur enn at hava kniplar í báðum. Gott val Obama.

**Sosialurin**

## Eru íslendingar framvegis norðbúgvar?

**BERGUR JACOBSEN**



Íslendingar hava megnað at selt seg sjálvan, sum "super norðhbúgvar", ið fram um okkum onnur, hava megnað at varðveita norðønna søgu og mentan!

Ætlanin við hesum reglum er ikki at sparka mannin, ið er fallin til jarðar. Men, júst í hesum døgum er oyggjafólkið fyri norðan tíðun at hoyra og síggja í fjølmiðlunum, og eyðkennt fyri hesar sendingarnar er, at norðuratlantiska ættarfólkið velur eingilsku tunguna, tá samskift verður við málsligu ættarfókini í norðurlondunum, framum eina norrøna tungu.

Íslendingar hava allan rætt til at nýta sína málsligu orku og kunnan sum teimum hugar – men, eg skilji ikki hví supernorðbúgvanir finna tað neyðugt at nýta angelsaksiskt tungumál, tá teir samskifta við norðurlendsku brøðrartjóðurnar? Og hettar sigi eg júst tí at íslendingar hava verið dugnaligir til at selja seg sjálvar sum supernorðbúgvarnir, ið framum okkum onnur hava megnað at varðveita norrønt mál, norrøna søgu og mentan.

Kannska íslendingar einga at læra, at í norðurlondum eru vit enn norrøn og tosa norrøn mál og ikki angelsaksisk, tá vit samskifta okkara millum. Tann ósiðurin, ið alt meira er ein veruleiki í dag, at yngri fólk í Skandinavia velja at tosa saman á eingilskum í staðin fyri hvør á sínum móðurmali, er eitt tekin um mentunnarligt og málsligt fatakradømi, heldur ein um eina nýtimans heimsborgaramentan!

Tey árini eg arbeiddi í London, var eg av og á við til norðurlendarkar samkomur, har íslendingar róðu frammundir, at vit áttu at nýta eingilskt sum samskiftismál. Men vit sýttu fyri hesum við teirru grundgeving, at tá finnar funnu seg í at nýta svenskt í norðurlendskum høpi, so kundu íslendingar, sum norðbúgvar, eisini nýta eina norrøna tungu í teirra samskifti við okkum.

Eg havi eisini verið úti fyri, at sera dugnaligir íslendskir tónleikarar, ið hava nýtt Samuelskirkjuna til venjingar ella framførslur, hava tosað við meg á eingilskum - men, eg svarðaði aftur á mínum gatudanska! Tí hóast eg kenni meg sum heima á eingilskum, so tykist tað mær fremmant at tosa eingilskt við ein norðbúgva í Norurlondum.

Kannska eri eg tann einasti, ið er so erkvisin í hesum sambandi? Men tað frøddi meg kortini, tá eg í kvøld hoyrdi íslendska forsatismálaráharrann tosa gott norskt í sending í svenska sjónvarpinum. Onkusvegna býður tað mær ímóti sum norðbúgvi at byrja samrøðuna við eina annan norðbúgva við at siga: Do you speak English?

## Gávumentanin kroystir luftina úr politikkinum

**KLÆMINT ØSTERØ**
Valevni á lista B til býráðsvalið í Runavíkar kommunu



**Í meldrinum av vallyftum til borgaran verður politikkurin kveistraður til viks, og politikarin gerst jólamaður fram til valið 11. november**

"Hvat lovar tú?" Spyrja fólk flest, nú valfepurin er í luftini, og prátið fyri tað mesta snýr seg um politikk. Flestu valevni kenna seg bundin av at koma við einum játtandi svari, tá tey renna seg í ein slíkan spurning.

Vit fara ikki í føðingardag við ongari gávu, og halda heldur ikki jól við ongum jólagávum. Tað liggur líkasum í luftini, at vit vilja hava nakað afturfyri atkvøðuna. Nakað sum kann mátast, vigast ella í minsta lagið síggjast. Nakað ítøkiligt sum kann skapað eina ognarkenslu hjá viðkomandi. Allarflestu politikarar missa ondina við tað sama og byrja teirra politiska lív sum jólamenn.

Kommunuvalið 11. november verður fram um alt annað eitt politiskt val, har kósin skal setast fyri tey næstu 4 árini. Við heimsumfatandi fíggjarkreppu, lítlum og ongum búskaparvøkstri og óstøðugum arbeiðsmarknaði verður neyðugt at koma til kjarnuna í politikkinum, skal veturin ikki gerast longri enn neyðugt.

Politikkur snýr seg um raðfestingar. Um at leggja eitt tænastustøði fyri allar borgarar í kommununi. Alt frá vøggu í grøv. Politikkurin skal slóða fyri, so at framgongd er í øllum lutum.

Tað er í politikkinum at ósemjurnar liggja, og tað er í politiska handalagnum, at skilagóðar semjur verða funnar, og skulu hesar loysnir mynda kommunu og samfelag okkara frameftir.

Politikkurin eigur tí at verða savnandi, so at hann gerst mennandi fyri okkum øll.

Tískil snýr hetta valið seg um, hvørja støðu vit hava til tær tænastur, sum vit halda at kommunan eigur at veita borgarunum, og hvussu vit menna ta kommunalu fyrisitingina.

Hvat kann væntast av vinnuligum, sosialum og mentanarligum átøkum komandi 4 árini, og hvussu tryggja vit framhaldandi menning í kommununi?

Meginspurningarnir til teirra, ið manna komandi býráð, eru fleiri, og tað er av sera stórum týdningi, at vit, sum bjóða okkum fram, hava greiðar hugsanir um, hvussu vit reka og menna júst okkara kommunu, so at hon framvegis gerst ein livandi og mennandi bústaður fyri okkum øll og børn okkara.

Gott val

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.